Yngd á Ei›i, í Århus og alla a›rasta›ni

Í farnu viku var bla›stjórnin á Yngd í Århus í stuttum ørindum. Í tí sambandi fara vit í komandi blø›um at hava nakrar greinar frá hesum túri.

Fyrsta greinin er longu at lesa í bla›num í dag.

Jú, Århus er ein fantastiska deiligur b‡ur stórur, Hugnaligur, og hevur nærum óteljandi møguleikar. Ei undur í, at føroyingar í hópatali fara til Århus í útbúgvingarørindum.

Eisini um tú hevur ætlanir, bert at stuttleika tær eitt vikuskifti›, er Århus ein frálíkur b‡ur til tess. Náttklubbar vi› bæ›i disco og barrum. Nógvir biografar eru í b‡num, og so gera danir nógv av at fara á café. Men ta› er jú eisini ótrúliga hugnaligt. Jú, Århus er stutt sagt ein “fantrúligur” b‡ur. Av tí, at bla›stjórnin á Yngd var í Århus í seinastu viku, hava nakrar av gó›u gomlu kreftunum gjørt sítt til, at bla›i› kemur út í dag. Og ta› er bara at fegnast um. Tí uttan teirra hjálp var› bla›i› als ikki veruleiki.

Hesar gó›u kreftirnar hava gjøgnum vikuna fingi › fatur á nøkrum forkunnugum søgum.

Fyri fyrstu fer› í n‡ggju øldini hava vit á Yngd redaktiónini fingi› fatur á tilfari uttan fyri Havnina. Leygardagin í farnu viku var nevnliga ein sokalla messingstevna á Ei›i. Okkara ma›ur á Ei›i hevur sent okkum ein samandrátt ha›ani, sum er at lesa í bla›num í dag.

Skótarørslan hevur altí› veri› ein stórur partur av øllum frítí›arvirksemi, sum er í Føroyum. Tí hava vit valt at gera eitt sindur burtur úr hesum, og tí er ein grein um skótar og skótavirksemi at lesa í bla›num í dag.

Teir føstu tættirnir eru eisini vi› okkum í dag. Hitlistar, Svara so og Fløguummæli er tí at finna inni í bla›num.

Stórur partur av føstu tættunum er útlendskt tilfar, men ta› eigur ikki at vera nøkur loyna, at vit á Yngd leggja okkum eftir at skriva tilfar sum hevur vi› føroysk vi›urskifti at gera. Eitt nú um útbúgvingar í Føroyum.

Vit royna alla tí›ina at finna fram føroyskt tilfar, men hetta kann vera torført til tí›ir. Ikki minst tí, at vit búgva í einum so lítlum landi, og tí eru møguleikarnir avmarka›ir.

Eisini eigur at ver›a lagt aftrat, at føroyingar fyri okkum tykjast eitt sindur dovnir. Ta› er ógvuliga avmarka›, hvat vi› fáa sendadi av tilfari.

Harragud, bla›i› er jú ætla tykkum, so vit vilja heldur enn gjarna hoyra tykkara meiningar, rís, rós ella hvat ta› skal ver›a. Tit eru meira enn vælkomin til at senda okkum tilfar, ella tit bara hava eina yrking ella líknandi, sum gjarna skuldi veri› gott krút til okkara brævbumbu.

Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd“. Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3‘aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Bla›stjórn:
Jákup Bogi Joensen

Uppseting:
Karis Olsen

Ygnd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Les Yngd
í Sosialinum
Hvønn mikudag

Århus by night

Í farnu viku var undirrita›i í Århus í stuttum ørindum. Og lat ta› her beinanvegin ver›a sagt. Leygarkvøld í Århus má upplivast

Jákup Bogi Joensen

Ein av teimum stóru býunum í Danmark er Århus, har nógvir føroyingar búgva. Serliga er tað tann lesandi fjøldin, sum stúgvast kring býin.

Og lat tað verða sagt beinanvegin. Århus er ein fantastiska deiligur býur. Býurin er stórur og hugnaligur og hevur nærum óteljandi møguleikar at bjóða.

Í farnu viku var undirritaði í Århus í stuttum ørindum, og tað skal her verða sagt, at leygarkvøld í Århus má upplivast.

Klokkan nærkaðist átta, áðrenn farið varð frá húsum. Svongdin var byrjað at gera um seg, so gjørt var av at fara á Pizzaria. Men hetta var ikki eitt heilt vanligt pizzaria. Ikki tí. Hølini vóru stak hugnalig prýdd við alskyns tingum. Niður úr loftinum sóust nakrir sera vakrir og snotuligir búnar. Nakrir Fótbóltsbúnar. Ein danskur landsliðsbúni við navninum Tøfting á bakinum, ein Everton búni har Degn var prentað á og ein Udinese búni har Jørgensen stóð at lesa.

Hví, spyrt tú so kanska. Jú, teir eru allir sera kendir fótbóltsleikarar, sum miðskeiðis í 1990’unum gjørdu stóra fótbóltsfelagið í býnum, AGF, til nakað heilt serligt. Men felags fyri teir allar er, at teir vórðu seldir til útlendsk feløg. Hetta, tí fíggjarliga støðan í AGF var so út av lagi vánalig.

Men tak ikki feil. Århusianarar eru pávastoltir av sínum “dreingjum”, sum mongu seinnu árini hava gjørt vart við seg. Bæði í útlendskum feløgum og ikki minst á danska landsliðnum.

Longur yviri í einum horni sóust einir fimm guitarar, nógvar myndir av heimskendum tónleikarum, har Phil Collins átti størsta plássið.

Borðini vóru stak hugnaliga prýdd við livandi ljósum. Jú, rammurnar vóru, um ikki perfektar, so væl brúkiligar.

Eftir at vit høvdu fylt okkum við góðum mati, pizza og lasagne, gekk leiðin niðan í ein av nýggjastu og stásiligastu biografunum í býnum. Cine-city eitur hann. Og lat tað verða sagt beinanvegin. Eg mundi fingið chock, tá eg setti fótin innum. Ein risa stórur salur var karmur um okkurt, sum skuldi ímynda eina forhøll. Í einum horni stóðu nøkur borð og nakrir stólar, har møguleiki var fyri at rinda sær møðina. Hinumegin sóu vit tvær kioskir. Og um tú líður undir eini víðagitnari “fobi”, so eru ráðini, at tú ikki fer inn haðar. Halgadoyðs fólk ið har vóru inni, men tey keyptu dúgliga. Vit komu tó, eftir at hava tveitt nakrar hundrað krónur beint niður í kassan, út um aftur í øllum góðum.

Síðani settu vit beina leið inn í sjálvan biosalin, sum ikki var stórt annarleiðis enn stóri salur í Havnar Bio. Tó var salurin í Cine-city eitt sindur størri, og ljóðanleggið má hava verið framúr gott. Tí ljóðið var nevnliga “fantrúliga” gott.

Har settu vit okkum so. Heilt frammi á triðfremsta rað. Væl til rættist, klár til at “smósa” chips, ein stóran pakka av bomm, og eina mellem stor cola, sum tó tóktist væl størri enn størsta bikari í Havnar Bio.

Við eitt gjørdist totalt tøgn í salinum, og filmurin byrjaði. Tað hildu vit í øllum førum, men har fóru vit skeiv. Tí vit gloymdu sjálvandi hasar ólukksáligu reklamurnar, sum eftir mínum tykki eru meira til at styggja fólk burtur, heldur enn nakað annað. Men við eitt sløknaðu lítlu fittu lampurnar í salinum. Filmurin byrjaði. Hurrá, hurrá. Út úr einum horni av annars risa stóra skíggjanum kom Bruce Willis, sum í “Den sjette sans”, sum filmurin eitur, spælir eitt slag av sálarfrøðingi. Hann skal hjálpa einum smádrongi, sum hevur tey evni, at síggja fólk ganga aftur.

Haldi ikki vit her fara at siga meira frá filminum, men loyvi mær her at siga, at filmurin er eitt meistaraverk. Væl spældur og gjøgnumførdur, men óhugnaligur til tíðir. Absolut ikki fyri veikar sálir.

Eftir at Bruce Willis og aðrir góður sjónleikarar høvdu undirhildið okkum í stórum dosum í knappar tveir tímar, fóru vit, fyri líka sum at rista tað ringasta av okkum á café, har vit síðani sótu til langt út á náttina.

Eitt sera hugnaligt leygarkvøld í Århus skal eg heilsa og siga, men trúgv tí ella ei. Vit vóru á fótum longu klokkan sjey morgunin eftir. Tveir tímar svøvnur er nú ikki nakað at reypa av. Men soleiðis er at ganga til ræðufilmar. Eisini um tað nú er í Århus.